John Johannessen, yngsti maður á tingi:

# – Tú mást vísa virðing



*Mín fyrsti flokslærari situr í andstøðu í tinginum í dag, so tað er ein stuttlig støða at vera í. Tað sigur nýggi tingmaðurin John Johannessen um sín fyrsta flokslærara í fólkaskúlanum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Tá tú ert politikkari, so skalt tú sjálvandi vísa eina ávísa virðing. Men eg haldi, at tað er umráðandi framvegis at vera tann tú ert. Tað sigur John Johannessen, sum varð valdur á ting til løgtingsvalið í januar. Sosialurin hevur sett unga tingmanninum stevnu**

SAMRØÐA
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Tað er fríggjadagur í Havn. Fólk eru liðug at arbeiða, og fleiri lagnur eru at síggja í havnargøtum og havnarstøðum. Millum hesar lagnur er navnframur maður, løgtingsmaður, sum er fyrrverandi tíðindamaður. Hann situr á navnframari cafe, ungur og grønur sum hann er.

Blaðmaður er eisini millum fólkini á ymsu havnarstøðunum. Hann sær tann unga løgtingsmannin, sum situr aftarliga á cafe'ini. Leiðin gongur ímóti hansara borðið, eftir at ein drykkur er fingin til vega. Tosað verður ikki uttanum.

– *Góðan dagin, er tað gjørligt at fáa eina samrøðu í lag, verður spurgt.*

– Tað er gamaní, ongin trupulleiki, sigur 26 ára gamli løgtingsmaðurin.

Vit gera nærri avtalu um, nær vit skulu møtast og verða samdir um at hittast komandi mikukvøld á onkrum góðum og hugnaligum havnarstaði. Eftir fimm minuttum er okkara møtið fyribils liðugt, og vit fara hvør til sítt. Ein samrøða við unga og nýggja løgtingsmannin, John Johannessen, er fingin í kassan.

## Samrøðan byrjar

Vit eru aftur í Havnini vikuna eftir. Avtalan er, at vit skulu møtast á einari cafe, sum liggur eitt sindur longri uppi enn áðurnevnda. Klokkan er átta um kvøldið, og løgtingsmaðurin er klárur og bíðar eftir blaðmanninum. Løtu seinni er klárt at seta hol á, og vit sessast við gløsum og bandupptakara. Løgtingsmaðurin bjóðar, og samrøðan fer í gongd.

– Eg havi altíð havt stóran áhuga fyri samfelagsviðurskiftum. Tað varð helst eisini orsøkin til, at eg valdi løgtingsarbeiðið. Og tá tú so ert komin har, at tú tekur støðu til samfelagslig viðurskifti, so kann tað jú bert vera gott, sigur John Johannessen, sum varð valdur á ting í januar 2004. Tað er ikki fyrstu ferð, at ein fjølmiðlamaður er farin beinleiðis úr sínum faki og inn í politiska heimin. John Johannessen arbeiddi í Sjónvarpi Føroya, áðrenn hann stillaði upp til løgtingsvalið, sum varð útskrivað í úrtíð.

– Próvføring brúkar tú í bæði fjølmiðlaheiminum og í politiska lívinum, og samfelagsviðurskifti hoyra bæði politikaranum og fjølmiðlamanninum til. Men nú eri eg hinumegin borðið, sum helst ger tað lættari at svara upp á spurningar frá fjølmiðlunum, sigur John Johannessen við blaðmannin, sum situr hinumegin borðið á hugnaligu cafe'ini.

”

**John um lagnudagin:**

*– At fara upp í politikk var ikki ordiliga nakað, sum eg hevði planlagt. Tað hendi í veruleikanum nokkso løgið, og tað ger tað helst fyri tey flestu. Eg var ikki limur í nøkrum flokki, men mann hevur sjálvandi sínar hugsjónir. Men sum fjølmiðlamaður royndi eg at halda hugsjónirnar í bakgrundini og fjølmiðlafakið frammaliga. Men so setti Javnaðarflokkurin seg í samband við meg nakrar ferðir og bað meg stilla upp. Men eg segði nei. Til seinasta uppstillingarfund skuldi eg so svara endaliga, og tá segði eg aftur nei. Javnaðarflokkurin útsetti síðani henda fundin við kaffipausum og tílíkum, og bóðu meg umhugsa hetta einaferð afturat. So var tað, at eg tosaði við familju, og tað endaði við, at eg tók eina avgerð. Eg hugsaði við mær sjálvum, "ok, lat meg royna." So ringdi eg til tey á uppstillingarfundinum og boðaði frá mínum ætlanum. Og síðani ringdi eg til sjónvarpsstjóran og segði, at eg mátti fara í farloyvi í stundini, tí eg stillaði upp til løgtingsvalið. So fór eg til uppstillingarfundin, og tað var ein sera løgin kensla. Eg minnist, at tað var akkurát soleiðis, at eg kláraði at ganga um gólvið, tá eg so kom inn har. Hetta var ikki nakað, sum eg hevði planlagt, og eg visti væl, at tá eg fór út í hetta her, so tók eg grundalagið undan sjálvum fakinum, sum eg var í áðrenn. Men tað var so ein avgerð, sum eg tók, og tað eydnaðist.*

## Gamal lærari hjá John situr í andstøðuni

John varð kendur fyri síni





*Tá tú ert politikkari, so skalt tú sjálvandi vísa eina ávísa virðing. Men eg haldi, at tað er umráðandi framvegis at vera tann tú ert. Tað sigur John Johannessen, løgtingsmaður og fyrrverandi tíðindamaður í Sjónvarpi Føroya*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

ofta sera beinraknu innsløg í Degi og Viku.

– Tað var kanska ikki so løgið, at eg endaði í sjónvarpinum. Eg minnist væl, at eg sum smádrongur fekk ein bandupptakara og byrjaði at sita og redigara mínar egnu útvarpssendingar, sigur fyrrverandi journalisturin afturlítandi á barnaárini.

John er føddur í Havn og hevur stigi tey fyrstu fetini í Havnini, men hann hevur eisini búð í Suðuroynni, har hann gekk í studentaskúla. Fólkaskúlin varð eisini avgreiddur í Suðuroynni, og John minnist enn sín fyrsta lærara.

– Mín fyrsti flokslærari situr í andstøðu í tinginum í dag, so tað er ein stuttlig støða at vera í, sigur John smílandi, meðan vit fáa okkum uppí.

John Johannessen dylir ikki, at hann er glaður fyri leiklutin sum ein av teimum tvey og tretivu í Løgtinginum.

– Tað er altíð stuttligt at vera í einum arbeiði, sum tú trívist í. Og eg trívíst væl í løgtingsarbeiðinum og trúgvi uppá, at tað ber til at gera nakað til nyttu í hesum arbeiðinum, sigur John Johannessen, sum í góðar hundrað dagar hevur havt sæti á Føroya Løgtingi.

## Hvar hoyrir John Johannessen heima?

Nýggi politikkarin hjá Javnaðarflokkinum situr í mentanarnevndini og uttanlandsnevndini hjá Løgtinginum. John brúkar nógva tíð upp á tingarbeiðið, sum hann tekur í størsta álvara. Nógv tilfar verður latið tingmonnum, og tískil hevur nýklakti tingmaðurin nógv at lesa. Hann tekur eisini orðið á Løgtingsins røðarapalli, tá orsøk er fyri tí.

– Men retorikkur, um tað bara eru orð, so kann tað ikki brúkast til serliga nógv, tí tað má liggja ein meining aftanfyri tað, sum verður sagt, sigur John Johannessen, sum í síni grundhugsjón trýr upp á javna og samhaldsfesti.

– Eg trúgvi upp á tey samhaldsføstu virðini. Samfelagið skal geva pláss fyri øllum samfelagsbólkum, uttan mun til hvørjari stætt tú ert av, sigur John Johannessen, nú prátið á cafe'ini er fallið inn á politiskar hugsjónir.

– Eg haldi, at tá talan er um at seta seg inn í viðurskiftini hjá teimum veiku í samfelagnum, og teimum sum eru komin illa fyri, so veit eg í ávísum førum, hvat tað snýr seg um frá mínum egna lívi, sigur tingmaðurin hjá Javnaðarflokkinum. Hann leggur afturat, at tey nærmastu hava sera stóran týdning í hansara lívi.

– Mínir vinir hava heilt ómetaliga nógv at týða fyri meg, og tað hevur familjan sjálvsagt eisini, sigur tingmaðurin um familju og vinir.

John sigur eisini, at tað kann verða trupult at finna útav, hvar hann hoyrir heima, tí foreldrini eru úr hvør sínum enda av landinum, og hann hevur stigið tey fyrstu fetini mitt ímillum tey bæði støðini.

– Tað er heilt ómetaliga trupult at svara uppá, hvør John Johannessen er. Eg eri føddur og búgvi í Havn. Pápi mín var úr Klaksvík, og mamma mín úr Suðuroynni, sigur John, tá spurgt verður um, hvar hann stavar frá.

## Ymiskt hugnaligt fyriferst í tingsalinum

John Johannessen hevur búð helvtina lívinum í Havnini, og hann býr í dag á Reyni, tætt við Tinganes og tætt við cafe'ina, sum vit sita á. Hann sigur, at tað er deiligt at búgva so tætt við Løgtingið og Gamla Apotekið, har hann hevur sína dagligu gongd. Og vælnøgdur er hann eisini við tingarbeiðið, og honum dámar í heila tikið væl at vera í tingsalinum.

– Tað fyriferst ofta ymiskt hugnaligt í tingsalinum, tá andstøða og samgonga fara at arga hvørja aðra, og sum síðani eru vinir alíkavæl, tá tingfundurin er liðugur, sigur John Johannessen.

John leggur dent á, hann hevur stóra virðing fyri Løgtinginum og tingarbeiðinum. Men hann heldur tað hava stóran týdning, at tú ikki missir teg sjálvan burtur.

– Tá tú ert politikkari, so skalt tú sjálvandi vísa eina ávísa virðing. Men eg haldi, at tað er umráðandi framvegis at vera tann tú ert, sigur John Johannessen, løgtingsmaður og fyrrverandi tíðindamaður í Sjónvarpi Føroya.

Nýggi tingmaðurin kennir seg væl í politiska umhvørvinum, og hann hevur í skrivandi løtu ongar ætlanir um at venda aftur til fjølmiðlastarvið.

– Sjálvsagt stillar tú uppaftur, tá tú fyrst ert komin upp í politikk. Tú mást royna at stremba og halda so leingi sum gjørligt, sigur ein støðufastur John Johannessen, áðrenn vit venda gløsunum og fara hvør til sítt.

### *Ov nógv grót og asfalt í Løgtinginum*

*– Eg haldi, at alt ov stórur partur av tingarbeiðinum snýr seg um grót og asfalt, men alt ov lítið um størri og yvirordnaði samfelagslig viðurskifti. Tað gongur næstan ein heilur dagur við at kjakast um, hvussu tjúkt asfaltið á onkrum vegi skal verða, og tað kann ikki verða meiningin.*

*John Johannessen um tingarbeiðið*

”

**Hví varð John kallaður Jokarin:**

*– Jóannes Eidesgaard var komin til at siga í eini blaðsamrøðu, áðrenn uppstillingin var liðug, at Javnaðarflokkurin skuldi nokk klára tað, tí teir mundu fara at finna ein jokara. Hetta var helst nakað, sum hann hevði sagt í skemti, men aftaná ta greinina ringdi Tobbi til mín, sum dámar væl at skemta, og segði seg hava frætt, at eg var Jokarin hjá Javnaðarflokkinum. Tað var yvirhøvur ikki komið mær til hugs at stilla upp, men so gongur ein máni, og eg komi á listan, og so bleiv eg bara til »Jokarin hjá Javnaðarflokkurin.«*